# Nýggja nevnd í Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag

Hóskvøldið var nevndarfundur í Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag. Á fundinum varð gjørt av at skipa fyri almennum fundum í vár og í heyst. Evni á fyrsta fundinum sum verður í vár verður »Suðuroyarætlanin og framtíðin hjá Suðuroynni«. Ætlanin er at hava fundir í heyst, og sjálvt um evnini ikki eru løgd føst enn er greitt, at eitt evni verður »ungdómspolitikkur«.

Annars skipaði nevndin seg eftir aðalfundin 7. mars við Mikkjal Sørensen sum formanni.

Nevndin sær nú soleiðis út
Mikkjal Sørensen, Porkeri, formaður
Jacob H. Poulsen, Sumba, næstformaður
Karin Strøm, Vágur, skrivari
Eyðhild Poulsen, Vágur, kassameistari
Marius Kjærbæk, Vágur, nevndarlimur
Annebeth Abrahamsen, Porkeri, eykalimur
Ebba Vágsheim, Vágur, eykalimur

# Fegnast um møguleikar fyri samstarvi við ES

GRANSKING

Fróðskaparsetrið fegnast um, at Jóannes Eidesgaard løgmaður á ferð síni í ES samveldinum hevur virkað fyri, at Føroyar og ES fáa møguleikar fyri samstarvi á útbúgvingar- og granskingarøkinum.

– Vit á Fróðskaparsetrinum bjóða okkum fram at vera við til at menna og troyta hesar møguleikar fyri granskingarsamstarvi og útbúgvingarsamstarvi við ES samveldið, sigur Jóan Pauli Joensen, rektari í stuttari viðmerking.



## Merkið

*Á Slættaratindi*
*tú fosturlandið skoðar,*
*við tign og tøgn –*

*Á markusarmessu*
*fyri seksti fimm árum –*
*várt merki var vígt.*

*Tann fyrsta viðurkenning*
*úr Stóra Bretlandi kom. –*
*Tøkk skulu tit fá.*

*Í orrustu tit sigldu –*
*vár fedrar av víkingarót – oyggjasynir –*
*– tit bardust fyri land og fólk.*

*Nú flaggið blaktrar á heimsins høvum –*
*lat okkum fylgjast um merkið*
*vit ei gloyma – í tøgn minnast.*

**Viggo Olsen**

# Ritgerðarkappingin Dópur og Navnagáva

Seinasta heyst skrivaði Fróðskaparsetur Føroya út ritgerðarkapping við heitinum »Dópur og navnagáva«, inn komu fýra handrit.

Jákup Reinert Hansen, sóknarprestur og Anfinnur Johansen, lektari hava mannað dómsnevndina, sum hevur viðgjørt tey innkomnu handritini. Teir hava latið rektaranum á Fróðskaparsetrinum niðurstøðu sína, og í hesum sambandi verður skipað fyri samkomu á Setursskrivstovuni mikudagin 20. apríl klokkan 13.30, har tey, sum hava latið inn, fáa virðislønir og viðurkenning fyri luttøkuna í ritgerðarkappingini.

Samkoman verður á Setursskrivstovuni, J. C. Svabos gøtu 14, mikudagin 20. apríl klokkan 13.30.






LÆRLINGUR
til Idé Møblar

Idé møblar søknast eftir einum evnaríkum og miðvísum lærlingi, ið kundi hugsað sær útbúgving í okkara spennandi møblahúsi.

**Okkurt um teg**
Vit vænta av tær, at tú hevur handilsskúlaútbúgving og hevur hug at arbeiða við íbúðarinnrætting. Tú hevur sjálvsálit, ert fyrikomandi og opin.

**Okkurt um okkum**
Vit bjóða eitt spennandi starv í einum nútímans møblahúsi, ið setir tænastuna í hásæti. Arbeiðsviðurskiftini eru góð við skiftandi arbeiðstíðum innan fyri eina vanliga arbeiðsviku. Uppi í lærutíðini er eisini skúlagongd á Handelsfagskolen í Odder.

**Umsókn**
Send eina stuttorðaða lýsing, merkt lærlingur, til okkara skjótast gjørligt. Vit hava brúk fyri tær at byrja sum skjótast, men vit bíða gjarna eftir tí rætta.

IDEmøblar
Uppi á Hálsi · Tel 35 46 80

# Forsøla til 3 Havfrýr byrjar

Mánadagin byrjar forsølan á www.billetnet.dk av atgongumerkjum til konsertina við teimum trimum Eivør, Guðrun Sólju og Lenu í Keypmannahavn.

Tað er kvinnublaðið Kvinna, sum skipar fyri forkunnungu konsertini, har tær tríggjar songkvinnurnar fyrstu ferð eru á palli saman. Konsertin hevur fingið heitið 3 Havfruer, og síðani mars mánað hava lesarar í Føroyum havt møguleika at keypa atgongumerki á heimasíðuni hjá blaðnum.

Frá mánadegnum ber nú eisini til hjá lesarum uttanlanda at keypa atgongumerki á donsku heimasíðuni. Í hesum sambandi hevur Kvinna gjørt ein bannara, sum sæst ovast á síðuni. Við at klikkja á bannaran, kemur nýggja heimasíðan www.3havfruer.dk fram, sum Kvinna hevur gjørt til konsertina. Á nýggju heimasíðuni fæst alt at vita um sjálva konsertina, umframt at til ber at hoyra brot úr tónleikinum, sum verður á skránni. Bæði orkestrið og tónleikaskráin á konsertini eru sett saman til júst hetta høvið. Tað er Edvard Nyholm Debes, sum er kapellmeistari í orkestrinum, sum er sett saman av føroyskum og donskum tónleikarum og kórgentum.

Í løtuni verða á leið 500 konsertplakatir hongdar upp ymsa staðni í Keypmannahavn, og mánadagin verða ikki færri enn 17.000 teldupostar sendir haldarum av tíðindatænastuni hjá www.billet.dk við tíðindum um konsertina.

Konsertin 3 Havfruer verður í Falkoner Centrinum í Keypmannahavn 4. juni.

**ave**